# Soleiðis verður samleikin til

Vit verða tey, vit eru, saman við øðrum menniskjum. Samleikin verður til í fýra stigum. Øll fýra stigini saman skapa okkara samleika.



*Tá ið vit traðka í leiklutin sum fjeppari ella 12.maður, rúmar hann bæði sosialan og felags samleika*

**1. Rætt svar – set striku millum setningarnar**

| | |
|---|---|
| Grundleggjandi eg-kenslan er | kjarnin í okkara samleika |
| Okkara egna fatan er mátin vit síggja | saman við øðrum |
| Sjálvsfatanin verður skapt | onnur |





## Eg – samleikin

Eg-ið er kjarnin í okkara samleika. Tað er grundleggjandi kenslan av tær. Partur av eg-samleikanum er, at vit kenna ein samanhang millum fortíð, nútíð og framtíð. Ein annar partur av eg-samleikanum er, at vit føla, at tað vit halda um okkum sjálv, er eisini tað, ið okkara nærmastu halda um okkum.

## 2. Uppgáva:
## Skriva tríggjar eginleikar, ið tú vísir, uttan at hugsa um, hvørjum tú ert saman við

1. ________________________________

2. ________________________________

3. ________________________________

## Persónligi samleikin

Persónligi samleikin liggur tætt at eg-samleikanum. Persónligi samleikin eru teir serligu eginleikarnir, vit hava, og sum gera okkum til tey, vit eru. Tískil snýr persónligi samleikin seg um, hvussu vit uppfata okkum, og hvat vit ætla okkum at vera. Persónligi samleikin er eisini tengdur at, hvussu vit síggja heimin, t.d. hvørji lívsvirði vit hava, hvørjar politiskar meiningar vit hava o.s.fr.

## Sosialur samleiki

Sosiali samleikin eru tey lyndiseyðkenni, vit við vilja royna at leggja dent á, tá ið vit eru saman við øðrum menniskjum. Við øðrum orðum, so er tað, hvat vit vilja at onnur skulu halda um okkum.
Kenslan av sosiala samleikanum kemur, tá ið vit uppliva at hava okkurt í felag við onnur. Hesi ”onnur” kunnu vera javnaldrar, skúlafelagar, fótbóltsliðið ella fimleikafelagið. Um so er, at vit hoyra til fleiri bólkar, sum vit ofta gera, so hava vit eisini fleiri sosialar samleikar.

## Felags – samleikin

Felags samleikin er kenslan av at hoyra til. Felags-samleikin tann breiði samleikin. Hann knýtir seg til kensluna av, t.d. at vera føroyingur og partur av føroyskari mentan.

## At skipa

Meðan tú lesur, skalt tú royna at skipa tína vitan um persónligan, sosialan og felags samleika.

## Hvat er hvat

**Koyr setningarnar í kassarnar**

1. Atferð, tá ið tú ert saman við øðrum
2. at hoyra til eina samkomu ella fólkaslag
3. Eins egna fatan av, hvør man er, og hvat man vil
4. at hoyra til eitt tjóðskaparligan ella mentunarligan felagsskap
5. Kenslan av at hava okkurt felags við onkran annan

## Fakta



**Eg-samleikin:**
t.d: ”Eg eri b-menniskja”

**Persónligi samleikin:**
t.d: ”Eg eri fyri størri persónligum frælsi í samfelagnum”

**Sosiali samleikin:**
t.d: ”Eg eri Víkingafjeppari”

**Felags samleikin**
t.d: ”Eg eri føroyingur”




**Útfyll ringin:** eg-samleiki, persónligi samleikin, sosiali samleikin, felagssamleikin.